


www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 10 - 2011

# Ísland bjóðar aftur til oljuleiting

Eftir at fyrsta útbjóðingin til oljuleiting á íslendska landgrunninum í fjør ikki fekk stórvegis undirtøku millum oljufeløg, hevur Ísland í dag aftur sett enn eitt útbjóðingarumfar á dagsskránna. Íslendski orkustovnurin hevur í dag kunngjørt nýggja leitiumfarið á Drekaleiðini í ein norðan og eystan fyri Ísland. Økið er 42.700 km2 stórt . Vatndýpið er 800 til 2000 metrar. Drekaleiðin er partur av Jan Mayen Rygginum. Seismiskar og aðrar kanningar vísa, at olja og gass kunnu vera goymd í undirgrundini, nú tey eru funnin í grannalagnum og í somu jarðfrøðiligum løgum aðrastaðni. Neyðugt er at bora brunnar fyri at staðfesta, um kolvetni er á Drekaleiðini sigur Orkustovnurin. Íslendskir myndugleikar hava sett sera strong umhvørvislig krøv eins og krøv til trygd í sambandi við loyvisumfarið  sum líkjast teimum í grannalondunum. Eisini brúk av mest framkomnu tøknini fer at verða eitt krav til oljufeløgini, sum fara at bjóða. Íslendsku myndugleikarnir hava longu gjørt hópin av kanningum, sum viðvíkja livandi tilfeingi í økinum og víst verður á, at ísfjøll fara ikki at tarna leiting eins og alduhæddin í økinum er lægri enn út fyri vesturnoreg, har oljuleiting er vanlig. Eingir stórir trupulleikar eru knýttir at boring í umrødda øki verður sagt í skrivi frá Orkustovninum. 2. leitiumfarið letur aftur 2. apríl næsta ár.